# Næmingar ígjøgnum 50 ár

**Í gjárkvøldið var kvøldseta í auluni í Kommunuskúlanum í Havn í sambandi við at Realskúlaframsýningin 1916-66 varð sett av borgarstjóranum, og fyrrverandi realskúlanæmingar hugleiddu um tíðina, tá tey gingu í skúlanum**

FRAMSÝNING

*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

Tað er Jórun Dánjalsdóttir, sum hevur skipað fyri framsýningini, og hon byrjaði kvøldsetuna viða at siga frá um hugskotið og takkaði teimum, sum hava stuðlað henni í arbeiðinum á ymiskan hátt.

Síðan varð sangurin "Yndislig føgur" sungin, meðan Hanus Joensen, skúlastjóri, spældi upp á gamla orglið, sum ein av lærarunum í Realskúlanum, Jógvan við Ánna, m. a. nýtti til morgunsang.

Eftir tað hugleiddu Heri Mørkøre og Sólrun Michelsen, fyrrverandi næmingarnir í realskúlanum, um skúlatíðina. Hetta gjørdu tey á ein sera skemtilan og hugtakandi hátt, soleiðis at nógv minnir vóru vakt, og fyrrverandi næmingarnir gleddu seg til at sleppa at síggja sjálva framsýningina við teimum umleið 500 myndunum av næmingum og lærarum í Færøernes Mellem- og Realskole frá 1916 til 1966,

umframt aðrar myndir og hópin av tekningum sum næmingarnir høvdu teknað fyri umleið 50 árum síðan - litríkar og kreativar tekningar.

Køldsetan endaði við, at framsýningin varð sett av Heðini Mortensen, borgarstjóra í høvuðsstaðnum. Fyrrverandi næmingarnir fóru tá at hyggja at myndunum, og har varð nóg mikið at tosa um og hyggja at restina av kvøldinum.

Framsýningin heldur fram heilt til 5. august. Opið er soleiðis: 24. til 31. juli frá kl. 15–20, 1. til 4. august frá kl. 10-20, og 5. august frá kl. 15-20.



*Nógv fólk vóru til kvøldsetuna í Kommunuskúlahøllini í gjárkvøldið, tá framsýningin við realskúlamyndum frá 1916 - 1966 lat upp*



*Jórun Dánjalsdóttir hevur savnað saman myndir og fyrireikað framsýningina*



*Talan er um einar 500 myndir av realskúlanæmingum, sum gingu í skúla frá 1916-1966*





*Heri Mørkøre og Sólrun Michelsen hugleiddu um tíðina í realskúlanum*



